## Alexander Wurz avloysir Mark Webber í 2007

Tað vera Alexander Wurz og Nico Rosberg, ið skulu koyra bilin hjá Williams í formil 1 koyringunum í 2007, skrivar f1.com. Royndarkoyrarin Wurz avloysir sostatt Mark Webber, ið tykist á veg til Renault.

Alexander Wurz var í sein hálvfemsunum formil 1 koyrari fyri táverandi Bennetton liðið, men varð skiftur út. Hann var síðan fýra ár royndarkoyrari fyri McLaren Mercedes, áðrenn hann í ár gjørdist royndarkoyrari hjá Williams.

Bæði Williams liðið og Alexander Wurz gleðast um nýggju avtaluna. Í síðstu viku almannakunngjørdi Williams, at frá komandi kappingarárið koyrir liðið við Toyota motorum, talan verður um sømu motorar, sum Toyota liðið koyrir við

Mark Webber, ið seinastu tvey árini hevur koyrt fyri Williams, hevur Renault stjóran Flavio Briatore sum umboðsmann, og tað hevur ljóðað, at Webber verður liðfelagi við Giancarlo Fisichella í Renault komandi ár, tó er einki vátta hesum viðvíkjandi.

**-nud**

**Formula-deildin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **1 EB/S** | **16** | **10** | **-** | **4** | **-** | **2** | **40** | **18** | **22** | **34** |
| 2 KÍ | 17 | 7 | - | 8 | - | 2 | 36 | 20 | 16 | 29 |
| 3 NSÍ | 16 | 8 | - | 5 | - | 3 | 31 | 19 | 12 | 29 |
| 4 B36 | 16 | 8 | - | 5 | - | 3 | 27 | 15 | 12 | 29 |
| 5 HB | 17 | 8 | - | 5 | - | 4 | 37 | 29 | 8 | 29 |
| 6 GÍ | 17 | 7 | - | 7 | - | 3 | 23 | 18 | 5 | 28 |
| 7 Skála | 17 | 4 | - | 4 | - | 9 | 17 | 19 | -2 | 16 |
| 8 VB/S | 17 | 3 | - | 3 | - | 11 | 17 | 50 | -33 | 12 |
| 9 B68 | 17 | 2 | - | 4 | - | 11 | 17 | 35 | -18 | 10 |
| 10 ÍF | 16 | 2 | - | 3 | - | 11 | 16 | 38 | -22 | 9 |



*Tímarnir, sum Marni hevur nýtt í Gundadali upp á føroyskan fótbólt – og serliga HB – eru nógvir. Nú er ætlanin at gera eina veruliga fótbóltsalfrøði, har mest sum allir statistiskir upplýsingar um føroyskan fótbólt kunnu heintast*

burdi verið eitt náttúrligt krav til dómaran, hvørji ting verða skrásett, soleiðis at tað ikki er upp til einstaka dómaran, um hann tímir at skriva ella ikki.

– Hetta seinasta hevur serliga verið sjónligt, so hvørt sum dómaraseðlarnir eru broytt. Tað tekur sína tíð, áðrenn dómararnir venja seg við, at nú skal hetta og hatta skrivast á. Fyri tær ovastu deildirnar og fyri steypakappingina eigur tað at vera eitt púrasta náttúrligt krav, hvat skal skrásetast og ikki, so á tí økinum eru vit framvegis eftirbátar.

– Megna vit at savna tað inn, sum á nakran hátt er gjørligt fyri farnu árini, samstundis sum vit fáa lyft støðið her ífrá og frameftir, so haldi eg, at nógv er rokkið. Tá skrásetingarnar hava verið somikið óneyvar, so verður yvirlitið sjálvandi ikki fullfíggjað so øgiliga nógv ár aftureftir. Men mítt mál er so eisini, at vit í framtíðini ikki fáa sama trupulleika.

# Uppgávan vendir frameftir

**Føroyski landsliðsvenjarin heldur, at hansara uppgáva í dag er at byggja eitt framtíðar landslið upp. Tí biður hann eisini um, at liðið og spælararnir fáa tíð at búnast, heldur enn at krevja sensatiónir her og nú**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Eftir at hava sagt farvæl til hópin av spælarum við drúgvum altjóða royndum er setningurin nú at finna eitt nýtt ættarlið at manna føroyska fótbóltslandsliðið*

Seinnapartin hósdagin kundi Jógvan Martin Olsen fyri fyrstu ferð seta navn á teir spælarar, sum hann hevur valt at arbeiða við í undankappingardysti. Maðurin, sum seinastu nógvu árini hevur verið hjálparvenjari, varð í ár settur sum høvuðsvenjari hjá fótbóltslandsliðnum, og eftir venjingarlegur og –dystir er royndartíðin nú av. Undankappingardystir standa fyri framman, og hóast Føroyar neyvan hava eina vón um at koma víðari úr okkara bólki, so er eingin ivi um, at hesir dystir verða tiknir í størri álvara millum manna.

Távit eftir úttøkuna tosaðu við landsliðsvenjaran, viðgekk hann, at úttøkan kanska enn var nakað leitandi. Men hann legið samstundis dent á, at hetta eisini hevði sínar orsøkir.

– Í mun fyri fýra árum síðani, tá Henrik tók við, so høvdu vit eitt lið, sum var í góðari javnvág. Vit høvdu eina rúgvu av spælarunum í besta fótbóltsaldri og við nógvum royndum. Eitt lið, sum veruliga var í hæddini til júst ta undankappingina.

– Síðani hava vit sagt farvæl til einar 10 av hesum spælarum. Ikki minst í verjupartinum, har eitt nú Jens Kristian Hansen, Øssur Hansen, Pól Thorsteinsson og Hans Fróði Hansen ikki longur eru við. Her hava vit so sett menn sum Súna Olsen, Jón Róa Jacobsen og Inga Højsted við, og teir eru allir skaddir í løtuni.

– Nú skal eg ikki grenja, men hetta er ein av orsøkunum til, at vit enn leita eitt sindur. Men tað liðið, sum vit hava tikið út hesaferð, er tann hópurin, sum vit í løtuni meta sum besta boð upp á eitt føroyskt landslið.

### Meinhardt í hitan

Tað navnið, sum vakti mest ans, tá hópurin varð úttikin, var uttan iva Meinhardt Joensen, sum vanliga er málverji hjá KÍ.

Hann var í landsliðshitanum fyri nøkrum árum síðani, men síðani hevur hann ikki gjørt tað heilt nógva um seg. Heldur ikki í KÍ, har hann við ársbyrjan varð roknaður sum eykamálverji, tí Paul Clapson skuldi verja málið. Clapson er tó eisini frálíkur útispælari, og við málmansspælinum frá Meinhardt og málunum frá Clapson er henda avgerð neyvan ein av tí slagnum, sum Tony Paris man iðra seg um í dag.

– Seinastu 3-4 árini hevur Meinhardt verið plágaður av einum ryggskaða, og eg haldi hetta vera fyrsta árið, at hann veruliga hevur kunnað vant ígjøgnum. Samstundis hava Jens Martin og lagt nógv fyri í royndunum at finna tann málverjan, sum er best skikkaður at taka við, tá Jákup gevst. Fleiri servenjingar hava verið á skránni, og í felag hava vit so valt tað, at Meinhardt skal í hópin hesaferð.

### Gevið liðnum tíð

At landsliðið í dag í nógv størri mun er sett saman av óroyndum spælarum, samstundis sum nakrir av avgjørdu lyklaspælarunum eru skaddir í løtuni, ger eisini, at vónirnar til liðið kanska ikki eru heilt so stórar, sum tær onkra tíð hava verið. Ein veruleiki, sum Jógvan Martin heldur ikki er bangin fyri at viðganga.

– Fyritreytirnar hjá mær at taka við nú og fyritreytirnar, sum Henrik hevði eru fullkomuliga ymiskar í allar mátar. Hann tók eitt lið, sum næstan var grýtuklárt at skapa úrslit, meðan mín uppgáva er at finna skikkaðar spælarar til eitt komandi føroyskt landslið. Her havi eg so lagt dent á, at vit skulu hava bóltspælarar á øllum plássum.

– Tí skulu vit kanska ikki rokna við tí allar mesta her og nú. Men tað ættarliðið, sum vit nú seta við, skuldi gjarna verið eitt sera sterkt landslið um eini 4-6 ár. So í so máta kanst tú gott siga, at vit enn eru eitt sindur trilvandi.

## HÓPURIN

| | |
|---|---|
| Jákup Mikkelsen | B36 |
| Meinhardt Joensen | KÍ |
| Atli Danielsen | KÍ |
| Vagnur M. Mortensen | HB |
| Óli Johannesen | TB |
| Janus M. Joensen | HB |
| Pauli Hansen | Skála |
| Kári Nielsen | HB |
| Jákup á Borg | HB |
| Fróði Benjaminsen | B36 |
| Bergur Midjord | B36 |
| Hanus Thorleifsson | B36 |
| Claus B. Jørgensen | Coventry |
| Rógvi Jacobsen | HB |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S |
| Símun Samuelsen | Keflavík |
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ |
| Andrew av Fløtum | Fremad Amager |

## NSI styrkir sær álopið

**Runavíkingar hava leigað álopsspælaran Thomas Gormsen úr danska SønderjyskE restina av hesum kappingarárinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á heimasíðu sínari skrivar danska felagið, at spælarin hevur sett fram ynski um at royna nakað nýtt, tá tað í ov lítlan mun hevur eydnast honum at fáa spælitíð á besta liði felagsins.

Ogítróttarstjórin í felagnum, Jacob Gregersen, sigur seg vera fegnan um, at tað hevur eydnast at fáa í lag leiguavtalu við runavíkingar. Ikki minst, tí spælarin við hesum ikki fer at spæla við liðum, sum SønderjyskE kappast við í næst bestu donsku deildini.

Sum skilst, so er talan um ein sera vandamiklan harra, sum runavíkingar soleiðis hava styrkt sær hópin við. Hóast hann ikki hevur spælt nógv á besta liðnum hjá felagnum, so eru mál í hópatali skorað hjá teimum næstbestu, og tí ivaðist felagið í, hvørt tað var rætt at missa ein somikið vandamiklan harra.

SønderjyskE var í fjør í donsku superliguni, og eitt skifti var Rógvi Jacobsen eisini í hópi teirra. Tað eydnaðist ikki at halda fast um plássið í deildini, men málið í ár er púra greitt at vinna seg aftur millum tey ovastu.



*Hetta er maðurin, sum skal styrkja álopspartin hjá NSÍ, nú farið verður undir seinnu kappingarhálvu*

Mynd: mynd: www.soenderjyske.dk